Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20



Aftur í eldin á flatlondum

Møguleiki ver›ur at síggja bæ›i Herfølge og FCK spæla t‡dningarmiklar dystir á Sælandi teir næstu dagarnar

Um knappar tvær vikur ver›ur hol sett á eitt n‡tt kappingarár í donsku superliguni. Sunnudagin 23. juli ver›ur fyrsta umfari› spælt. Tá skulu meistararnir úr Herfølge spæla á heimavølli ímóti meistarali›num í fjør, AaB. FCK skal eisini spæla á heimavølli. Teir fáa vitjan av Haderslev. Felagi› í Su›urjytlandi ver›ur fyri fyrstu fer› umbo›a› í bestu deildini. Ta› ver›ur spátt, at ta› fer at ver›a torført at standa seg hjá teimum, men kanska skal ikki ov nógv leggjast í hetta, tí fyri einum ári sí›ani var› ikki rokna› so nógv vi› teimum. Kortini megna›u teir at vinna næstfremsta plássi› í næstbestu deildini, og harvi› fluttu teir beinlei›is upp í superliguna.

Hitt n‡ggja li›i› í superliguni eitur FC Midtjylland. Talan er um eina samanrenning av Herning og Ikast. N‡ggja li›i›, sum sannførandi vann næstbestu deildina fyrr í summar, skal í fyrsta umfarinum spæla á heimavølli ímóti Lyngby.

Hinir dystirnir í fyrsta umfarinum ver›a hesir: Brøndby–AGF, AB–Silkeborg og OB–Viborg. Ta› vil vi› ø›rum or›um siga, at øll tr‡ feløgini, sum hava føroyskar spælarar í hópinum, skulu í fyrsta umfarinum spæla á Sælandi.

Óvissa í AGF

Ta› tykist rættuliga sannlíkt, at Jákup Mikkelsen fer at verja máli› hjá Herfølge, og at Todi Jónsson ver›ur á li›num hjá FCK. Ta› er meiri ivasamt, hvussu ta› ver›ur hjá Óla Johannesen, sum hesar sí›stu vikurnar hevur strí›st vi› at koma í besta hópin í AGF.

Í Århus halda teir seg ikki hava rá› at rinda so nógv í løn, sum teir gjørdu í fjør. Tí hava teir bo›a› fleiri spælarum frá, at ta› ver›ur ikki rokna› vi› teimum, og at ta› stendur teimum frítt at gera sáttmálar vi› onnur feløg.

Fleiri spælarar hava tiki› hetta til eftirtektar. Tann sí›sti er íslendingurin Tomas Ingi Tomasson, sum hevur veri› í álopinum og á mi›vøllinum hjá AGF. Á›renn Tomas Ingi flutti til Århus at spæla bólt, spældi hann saman vi› Una Arge í álopinum hjá Leiftri. Undan vikuskiftinum var› avtala gjørd millum AGF og ÍBV. Felagi› í Vestmannaoyggjunum skal fyribils í tríggjar mána›ar leiga álopsmannin. Ta› vil vi› ø›rum or›um siga, at nú fer n‡ggi ma›urin í ÍBV at kappast um eitt álopspláss vi› Allan Mørkøre.

Stórdystir á skránni

Longu komandi dagarnar ver›ur møguleiki hjá føroyingum í danska høvu›sta›num at síggja bæ›i Toda Jónsson og Jákup Mikkelsen royna seg á høgum stø›i.

Í morgin fáa Todi Jónsson og FCK vitjan av skotska stórfelagnum Celtic. Tann dysturin ver›ur spældur í Parkini í anna›kvøld.

T‡skvøldi› í komandi viku fara Jákup Mikkelsen og Herfølge at spæla Super Cup dyst á heimavøllinum í Herfølge. Talan er um árligu uppger›ina millum meistarali›i› og ta› li›i›, sum sí›sta kappingarári› vann steypakappingina. Herfølge vann DM, og hevur tískil heimavøll. Mótstø›uli›i› ver›ur Viborg, sum vann steypafinaluna. Uppger›in í Herfølge millum hesi bæ›i li›ini t‡skvøldi› í komandi viku fer at markera, at hol ver›ur sett á eitt n‡tt kappingarár. Og annan sunnudag ver›ur so ta› fyrsta av í alt 33 umførum í landskappingini á skránni.

jh

Mótstø›an ver›ur øgilig hjá KÍ

Lítil ivi man vera um, at jugoslaviska li›i›, sum kemur til Føroya í dag, er besta fótbóltsli›i›, sum nakrantí› hevur veri › í Føroyum

Í anna›kvøld skal KÍ royna seg í Europa Cup á heimavølli. Tí›liga í ár droymdi Tomislav Sivic um, at ta› skuldi eydnast KÍ at spæla seg ví›ari úr fyrsta innlei›andi umfarinum. Út frá royndunum vi› B36 ímóti Ankaaragücu úr Turkalandi í fjør rokna›i venjarin vi›, at ta› vóru møguleikar at koma ví›ari í næsta umfari› – um lutakasti› laga›i seg væl fyri KÍ.

Um hepni› í lutakastinum ver›ur gjørd upp í sannlíkinum fyri at síggja flottan fótbólt, so var lutakasti› hjá KÍ heppi›. Um hepni› ver›ur mált í sannlíkinum fyri samantaldum sigri og harvi› ví›ari luttøku í næsta innlei›andi umfarinum, so var talan um eitt sera óheppi› lutakast hjá klaksvíkingum.

Rey›a Stjørnan úr Beograd er sigursvandasta felagi› í Jugoslavia, og ta› er úr hesum felagnum, at nógv teir flestu av evnaríku og kendu jugoslavisku spælarunum, sum hava roynt seg og royna seg í stórfeløgum kring Europa, eru komnir frá. Vit kunnu t.d. nevna Proceneski, Savicevic, Stoikovic og so Dejan Stakovic, sum fyri ikki so langari tí› sí›ani var› seldur úr Rey›a Stjørnuni og til Lazio í Italia. Prísurin var 25 milliónir US dollarar!

Ta› er stór kapping um at sleppa á li›i›. Spælararnir, sum hava ey›kendu jugoslavisku fótbóltsdygdirnar – teir eru skjótir, bólttryggir, hava stórt taktiskt medvit og eru kropssterkir – kenna ta› sum ein hei›ur at umbo›a Rey›u Stjørnuna. Í Jugoslavia ver›ur ta› mett sum ta› hægsta, sum ein fótbóltsspælari kann røkka í heimligum fótbólti, um hann ver›ur innlima›ur í hópin hjá Rey›u Stjørnuni.

Ta› er ikki altí› í fyrstu atløgu hjá spælarunum ein spurningur um prís og løn. Heldur hevur ta› t‡dning, at sannlíki› fyri at fáa ein gó›an sáttmála í vestureuropeiskum feløgum økist, tá tú umbo›ar Rey›u Stjørnuna. Í sær sjálvum ver›ur ta› mett sum frábo›an um, at talan er um ein gó›an spælara.

Eingir landsli›smenn

Jugoslaviska fer›alagi› lendir í Vágum á middegi í dag. Teir koma vi› leiguflogfari› beinlei›is úr Beograd, og teir fara avsta› aftur beinanvegin, tá dysturin er li›ugur í anna›kvøld. 33 fólk eru í fer›alagnum, og av teimum eru átjan fótbóltsspælarar.

Tá ta› var greitt, at KÍ skuldi spæla ímóti Rey›u Stjørnuni úr Beograd, var› sta›fest, at tríggir av spælarunum, sum vóru vi› jugoslaviska landsli›num í EM endaspælinum í Hollandi og Belgia, umbo›a›u Rey›u Stjørnuna.

Sí›ani tá er ein av landsli›sspælarunum seldur. Hinir bá›ir landsli›smenninir eru ikki vi› í fer›alagnum, sum kemur í Vágar, og sum skal halda til á sjómansheiminum í Runavík og í hølunum, sum Tryggingarfelagi› Føroyar eigur í Runavík.

Landsli›smenninir eru eftir EM endaspæli› troyttir av fótbólti, og teir hava fingi› loyvi at halda summarfrí í nakrar vikur, me›an hinir fyrireika seg til n‡ggja kappingarári› og avgrei›a fyrsta innlei›andi umfari› í Europa Cup kappingini.

Hvørki í felagnum ella í jugoslavisku pressuni ver›ur rokna› vi›, at ta› ver›ur nakar sum helst trupulleiki hjá Rey›u Stjørnuni at vinna samanlagt á KÍ. Spurningurin er heldur, hvussu stórur sigrarnir fara at vera, og ta› er ikki óhugsandi, at landsli›smenninir bá›ir eisini fara at halda frí, tá KÍ í komandi viku fer at vitja í Beograd.

Kendur venjari

Venjarin hjá Rey›u Stjørnuni er sera nógv virdur bæ›i í felagnum, sum hann nú hevur ábyrgdina av, og í fronskum fótbólti, har hann hevur arbeitt í fleiri ár, og har hann hevur rokki› merkisverdum úrslitum.

Venjarin eitur Slavoljub Muslim, sum á›ur hevur spælt fleiri enn 400 dystir fyri Rey›u Stjørnuna. Hann var venjari, tá franska Bordux vann meistaraskapin, og hann stó› á odda, tá Lens luttók í Europa Cup.

Í Jugoslavia hevur Muslim ta› sko›smáli›, at hann er ein væl útbúgvin gentlema›ur, sum hevur veri› vi› til at givi› jugoslaviskum fótbólti n‡ggjan íblástur.

jh

KÍ skal venja í Jugoslavia



He›in á Lakjuni og hinir í KÍ skulu venja í Jugoslavia
savnsmynd

Eftir útidystin í Beograd skulu klaksvíkingar í eina viku venja í heimb‡num hjá Tomislav Sivic

Nú er ta› greitt, at klaksvíkingar í eina viku fara at fyrireika seg uttanlands til átta tey sí›stu umførini av landskappingini.

KÍ fer av landinum komandi leygardag. Tá ta› sn‡r seg um fer›ingina, so er skjott at or›ataki› um lortin og pannukøkuna kemur í hugan. Rey›a Stjørnu fer›alagi› kemur í Vágar vi› leiguflogfari í dag, og í anna›kvøld kemur leiguflogfar í Vágar eftir teimum.

Klaksvíkingar fara leygardagin til Keypmannahavnar. Bíligasta farlei›in hagani og til Beograd er umvegis Budapest. Úr Budapest ver›ur fari› vi› bussi til jugoslaviska høvu›sta›in. Túrurin er rokna›ur at taka seks tímar, og so mugu vit vóna fyri KÍ fer›alagi›, at hitabylgjan, sum ta sí›stu vikuna hevur plága› tey á Balkan og tey eystarlaga í Mi›alhavinum, ver›ur horvin, tá klaksvíkingarnir koma ni›ur hagar.

Fer›alagi› úr Føroyum ver›ur í Beograd í so miki› gó›ari tí›, at eingin vandi skuldi veri› fyri, at mø›in frá fer›ingini ver›ur nøkur hóttan fyri so gó›um avriki, sum ta› ber til, tá dysturin ver›ur á skránni annan mikudag.

Venjingarlegan

Longu í fyrsta umfarinum eftir summarste›gin stendur lagnan hjá KÍ í landskappingini upp á spæl. 6. august fer HB til Klaksvíkar. KÍ roynir at fyrireika seg sum frægast bæ›i til tann dystin og til teir, sum ver›a á skránni aftaná.

Tá Europa Cup dysturin á útivølli ver›ur li›ugur, fer KÍ fer›alagi› til Subotica. Hetta er næststørsti b‡urin í Jugoslavia. Tomislav Sivic er ætta›ur hagani, og ta› er har, at hann og familjan halda til, tá tey eru heima og halda frí. Tomislav hevur syrgt fyri, at KÍ kann venja har ni›ri í eina viku, og onkrir venjingardystir vera eisini á skránni.

Klaksvíkingar koma aftur til Føroya stutt undan ólavsøku.

jh

Happadráttar-seðlarnir kosta:

1/1 seðil...... 200,-
1/2 seðil...... 100,-
1/4 seðil...... 50,-

Sølan til seinna hálvár 2000 er byrjað.
70% av søluvirðinum fer til vinningar. Ongastaðni í ríkinum verður latið so nógv útaftur í vinningum.

Fyrsti dráttur verður 28. august, annar dráttur 9. oktober og triðji dráttur verður 27. november 2000.
Keypir tú seðilin áðrenn 17. august 2000, er seðilin við í øllum dráttunum.

Av ágóðanum fer 1/3 til ÍSF, og 2/3 verða settir í grunn ætlaður brekaðum.

Her fært tú happadráttarseðlarnar:

Jógvan Nybo
750 Viðareiði
Tel 45 10 93

Jonna Johannessen
740 Hvannasund
Tel 45 20 13

Arne Samuelsen
Heygavegur 11
700 Klaksvík
Tel 45 57 75

Anna J. Ellingsgaard
470 Eiði
Tel 42 31 02

Rasmus N. Hansen
520 Leirvík
Tel 44 30 01

Jana K. Mikkelsen
513 Syðrugøta
Tel 44 10 13

Marius Skaale
Mýravegur
620 Runavík
Tel 44 73 29

Jóhanna Heinisen
480 Skála
Tel 44 10 51

Miriann Dam
Lygnnes
410 Kollafjørður
Tel 42 10 61

Hansa A. Hansen
440 Haldórsvík
Tel 42 33 79

Gunn Joensen
350 Vestmanna
Tel 42 44 60

Hjørleiv Poulsen
280 Hestur
Tel 32 80 39

Ása Petersen
360 Sandavágur
Tel 33 24 54

Marianna Ellefsen
370 Miðvágur
Tel 33 31 64

Arngerð Davidsen
380 Sørvágur
Tel 33 31 61

Helga Lauritsen
388 Mykines
Tel 33 29 31

Bjarni Dalsgaard
220 Skálavík
Tel 36 12 41

Ása Niclasen
800 Tvøroyri
Tel 37 19 26

Magna Kjærbæk
900 Vágur
Tel 37 34 02

Ebba Thomsen
850 Hvalba
Tel 37 51 41

Óluva D. Persson
Áargeil 21
100 Tórshavn
Tel 31 47 91

Amanda Jacobesen
N. Finsensgøta 35
100 Tórshavn
Tel 31 19 84 & 31 25 37

Hin føroyski
HAPPADRÁTTURIN

31 65 11